VINNUSÍÐURNAR

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Stór skip við bryggju í Runavík

**- Atlantic Lady er 140 metrar long og er eini 8000 brt. til støddar. Longdin og dýpdin er eingin trupulleiki hjá Runavíkar havn. Dýpið úti á pierinum er 12 metrar, og tað er nógv meira, enn Atlantic Lady stingur, sigur havnstjórin, Jón Rosenblad**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Tey fylla nógv við bryggjuna í Runavíkar havn, móðirskipið Atlantic Lady, sum er 140 metrar langt – og trolarin, Rybachiy, sum skipar veiðina umborð á móðirskipið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Seinastu 10 dagarnar hevur stóra móðurskipið, Atlantic Lady, ligið við bryggju í Runavíkar havn. Skipið, sum er heimahoyrandi á Valetta á Malta, er mannað við russum, og tað eru eisini russar, sum eiga skipið.

Meðan Atlantic Lady hevur ligið í Runavík, hava einir fimm russiskir trolarar ligið uppat skipinum og avskipað fisk umborð. Í løtuni liggur russiski trolarin, Rybachiy og avskipar.

### Eingin trupulleiki

Jón Rosenblad, havnastjóri í Runavíkar kommunu, sigur, at Atlantic Lady er kend í føroyskum sjógvi, og skipið hevur eisini áður ligið á Runavík.

– Skipið er 140 metrar langt og er eini 8000 brt. til støddar.

Hann sigur, at longdin og dýpdin á hesum skipi er eingin trupulleiki hjá Runavíkar havn.

– Dýpið úti á pierinum er 12 metrar, og tað er nógv meira, enn Atlantic Lady stingur.

Havnastjórin sigur, at størsta skip, sum hann veit um hevur ligið við Runavíkar havn, var yvir 200 metrar langt. Hetta var eitt av ferðamannaskipunum, sum fyri nøkrum árum síðan vitjaðu býin.

### Vitjan í august

– Í fyrraári høvdu vit nøkur ferðamannaskip, sum vitjaðu kommununa, men í fjør var einki. Í august í ár koma tvey skip higar, og tað eina fer til Íslands og kemur aftur hendanvegin, áðrenn tað heldur leiðina fram. Hesi bæði skipini, sum koma at liggja við oljubryggjuna, eru einar 160-170 metrar long.

Jón Rosenblad væntar, at Atlantic Lady loysir aftur úr Runavík um einar 2-3 dagar.

# Casablanca fjúrtanda skipið á bedingini í ár

**Nýbygningurin, Fiskanes, sum Bjarni Kass letur smíða, verður liðugur á Tórshavnar Skipasmiðju 3. mai**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Casablanca hevur lagt veiðina upp og stevnir her upp á bedingina hjá Tórshavnar Skipasmiðju*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í gjár tók Tórshavnar Skipasmiðja kombineraða nótaskipið og trolaran, Casablanca, upp á bedingina.

Casablanca er heimahoyrandi í Murmansk, og á skipasmiðjuni skulu teir vaska og botnmála skipið.

Bedingsmeistarin, Kristoffur Lützen, sigur seg hava skilt, at russiski nótabáturin er gamli Hallarklettur, men hann er ikki vísur í, at so er.

– Eg haldi, at skipið líkist Hallarkletti, so tað fer nokk at halda, sigur hann.

Casablanca steðgar ikki leingi á bedingini, og tá hann fer av aftur, er bert eitt skip uppi í løtuni.

– Herfyri var bedingin full av skipum, og soleiðis gongur tað. Skip koma og fara. Summi steðga styttri og summi steðga longri.

Bedingsmeistarin sigur, at Casablanca er fjúrtanda skipið, sum er uppi á bedingini í ár.

– Í fjør høvdu vit tilsamans 80 skip uppi, sigur hann.

Kristoffur Lutzen sigur, at nýbygningurin Fiskanes, sum stendur í byggihøllini, skal verða liðugur 3. mai, og hann heldur, at arbeiðið at smíða skipið liðugt hevur gingið væl.

Skipasmiðjan eigur alt "konseptið". Skrokkurin er smíðaður í Póllandi og er av sama slagi, sum trolbátarnir, Hansa Maria og Skálafossur, sum áður eru latnir inn á Toftir og til Vestmannaar.

Hann sigur, at hesin nýbygningurin, sum Bjarni Kass eigur, hevur somu longd, sum Hansa Maria og Skálafossur hava í dag.

– Eftir at Hansa Maria og Skálafossur vórðu smíðaðir, eru teir longdir á Skála Skipasmiðju.

Á bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju strendur eisini fóðurskipið Nordic, sum hoyrir heima á Funningsfirði.

– Skipið skal hava nýggjar fóðurtangar og verður málað, nú tað stendur uppi, sigur bedingsmeistarin, Kristoffur Lützen.